# Eldur í Smyril Blue Water

**Tíðliga í morgun hevði eldur fest í bygningin hjá Smyril Blue Water á keiini. Sløkkiliðið í Havn fekk tó skjótt tamarhald á støðuni**



Eldurin í Smyril Blue Water var skjótt bastur

Mynd: Álvur Haraldsen

ELDSBRUNI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað var stutt fyri klokkan 5.30 í morgun, at ansingarfelagið Ansni boðaði frá eldi í bygninginum hjá Smyril Blue Water á keiini í Havn. Eldurin var so mikið umfatandi, at Ansni einki fekk gjørt við hann.

Sløkkiliðið varð beinanvegin boðsent, og var stutt eftir á staðnum.

Vakthavandi á politistøðini sigur, at talan helst er um, at eldurin er kyknaður í kaffistovuni í bygninginum, og at orsøkin til eldin nú verður kannað av servandum politistum.

Enn dugdi vakthavandi ikki at siga nakað um eldsorsøkina, men í løtuni er illgruni til elleidningar ella elinstallatiónir í kaffistovuni.

Vakthavandi dugdi heldur ikki at siga, um vørur høvdu fingið skaða.

Av Smyril Blue Water verður sagt, at telefonirnar virka ikki orsakað av eldinum, men fólk kunnu fáa fatur á felagnum við at ringja á fartelefonirnar, sum hava fylgjandi nummur: 239600, 239608, 239611, 239614. 239616, 239624 og 239625




Ert tú maður ella kvinna? Vilt tú vera við í okkara hvíta flokki? ja, so hava vit 4 farmakonom-læruplássá Tjalldurs Apoteki frá 1.september 2008

Tú byrjar longu 1. mai ella eftir nærri avtalu.

VILT TÚ TAÐ HEILSUGÓÐA LÍVIÐ?

Útbúgvingin í stuttum:

At læra um heilsu, heilivág og viðgerð við heilivági, hvørji evni eru í heilivágstilbúningum, hvussu heilivágur virkar og skal handfarast.

At arbeiða sjálvstøðugt og í toymum og taka avgerðir eftir galdandi lógum og kunngerðum.

At geva kundum okkara góða tænastu og leiðbeina í sambandi við útflýggjan av apoteksvørum.

Hvussu:

Útbúgvingin tekur 3 ár og skiftir ímillum arbeiði á apotekinum og skeið á Farmakonomskúlanum.

Viðmerkjast skal, at næmingalønin er góð:O)

Útbúgvingin er í samstarvi við Farmakonomskúlan Pharmakon í Hillerød - Danmark.

Les meira á www.pharmakon.dk og www.apotek.fo

Krøv til umsøkjaran:

Opið sinni og hug at arbeiða við fólki er eitt 'MUST'.
Students-, HF-, HH-, HT- ella Fiskivinnuskúlaprógv.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal sendast til.

Tjalldurs Apotek
Postboks 3010
110 Tórshavn
Tlf. 341100
Kontaktpersónur:
Elisabeth Joensen-Næs
Umsóknarfreist: 25.mars